# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

Góða kona, mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Kirstin Henriksen**
á Dul, Strondum
f. 11. juli 1927

andaðist leygardagin 23. august 2008.

Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju
mikudagin 27. august kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Jeffrei**
**Elin og Hervør**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at okkara elskaða mamma, vermamma, omma
og langomma

**Anna Hermannsen**
fødd Rasmussen, úr Havn
(Anna hjá Rasmussi á Háskúlanum)

andaðist leygardagin 23. august, 89 ára gomul.
Bønarhald verður á Tjarnargarði
týsdagin 26. august kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju,
mikudagin 27. august kl. 13.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Ada og Herman**

# Snorri Brend 50 ár

Í dag, mánadagin 25. august, fyllir Snorri Brend blaðmaður á Sosialinum, búsitandi í Hoyvík, 50 ár.



Snorri er føddur í Reykjavík, men er uppvaksin í Havn. Hann er elstur av teimum fýra børnunum hjá Almu Brend og Halldór Jóhannsson. Snorri er giftur Thurid, f. Lassen, av Viðareiði. Tey eiga døturnar: Dagunn, Rut og Noomi.

Snorri hevur havt eina sera fjølbroytta lívsleið og hevur starvsroyndir á nógvum ymiskum økjum. Í 1977 tók hann HF-prógv í Hoydølum. Frá 1979 til 1981 arbeiddi hann sum blaðmaður á Oyggjatíðindum. Eftir at hava tikið prógv sum fjølmiðlanæmingur í Norra í 1982, arbeiddi hann sum blaðmaður á Dimmalætting til 1987, tá hann fór at lesa til pleygara.

Hann var blaðmaður og layout-medarbeiðari á Trúboðanum og hjá Heimamissiónini í Føroyum frá 1991 til 1993, tá hann fekk starv sum pleygari á Deild 2 á Landssjúkrahúsinum, har hann arbeiddi frá 1993 til 1997. Hetta árið fór hann aftur at arbeiða sum blaðmaður á Dimmalætting.

Í 1999 flutti familjan til Noregs, har Snorri og Thurid gingu á bíbliuskúla í eitt hálvt ár, síðan gekk leiðin til Fraklands, har tey gingu á málskúla í eitt ár, áðrenn tey fóru til Mali í Vesturafrika, har tey arbeiddu sum trúboðarar til 2004 - Snorri við ábyrgd fyri einum studio til framleiðslu av útvarpssendingum á fulanimálinum.

Síðan hevur Snorri arbeitt sum blaðmaður á Sosialinum. Hansara høvuðsøki og stóri áhugi er at vitja bygdir og oyggjar kring landið, umframt at hann eisini hevur ábyrgd av átrúnaðarligu tíðindunum.

Snorri hevur eisini drúgvar royndir innan fyri sang- og tónleikaarbeiði í Havn og aðrastaðni. Hann var urguleikari við Havnar Kirkju í fleiri ár. Hann hevur sítt fasta pláss í Meinigheitshúsinum í Havn, umframt at hann er klokkari og hevur sunnudagsskúla í nýggju kirkjuni í Hoyvík.

Vit á Sosialinum ynskja okkara góða starvsfelaga, sum er burturstaddur á føðingardegnum, hjartaliga tillukku við 50 ára føðingardegnum.

**Heilsan**
**Starvsfelagarnir**

**Dagurin**
**26. august. Líradagur.** Dagurin verður eisini róptur líramariumessa, men tað hevur ongan kristiligan ella kirkjuligan týdning; navnið hevur dagurin fingið bara av teimum mongu mariumessunum um heystið.

# Kirstin Henriksen

## 11. juli 1927 – 23. august 2008



Leygardagin 23. august andaðist Kirstin Henriksen, fyrrverandi lærari, á Strondum, 81 ára gomul.

Kirstin var dóttir Louisu, f. Hansen, og Sofus Jensen, bæði av Strondum. Hon tók lærarapróg v á Føroya Læraraskúla í 1950 og var lærari í Tórshavnar Kommunuskúla skúlaárið 1950-51. Síðan var hon eitt skutt tíðarskeið lærari á Strondum og í Norðradali og á Syðradali. Seinni var hon av og á vikarur á Strondum og á Spesialskúlanum og Venjingarskúlanum í Havn.

Kirstin var gift Jeffrei Henriksen úr Sørvági, sum eisini er fyrrverandi lærari. Tey búsettust í Havn og fingu døturnar Elin og Hervør.

Kirstin og Jeffrei hava seinastu árini búð á Strondum.

# Trucker Festivalurin 2008

Í døgunum 30.-31. august verður Trucker Festivalurin 2008 hildin í Klaksvík.

Trucker Festivalurin hevur annars verið hildin í Runavík síðan 2003.

Á skránni verða nógv ymisk tiltøk fyri bæði børn og vaksin.

Í sambandi við Trucker Festivalin verður eitt innlegg í Sosialinum hósdagin 28. august við ymiskum tilfari um lastbilar og festivalin.

Bilradio á Rás2 hesa vikuna kemur eisini at snúgva seg um Trucker Festivalin.

**mg**

